# Vallarreglugerð

# 2026

*Rundskriv um treytir til leikvøll*

# Rundskriv um treytir til leikvøll

## Kapittul 1. Treytir

### § 1. Almennar treytir

Feløg sum luttaka í landskapping og steypakapping, sum Fótbóltssamband Føroya fyriskipar, skulu lúka fylgjandi treytir til leikvøll:

*Graslíki:*

Graslíkið skal í minsta lagi lúka treytirnar til FIFA Quality ella FIFA Quality Pro graslíki, og skal veitarin av graslíkinum vátta at hendan treytin er lokin.

Vallarmerkingarnar skulu lúka altjóða mát sum ásett av IFAB (International Football Association Board).

*Stødd á leikvølli:*

Leikvøllurin skal hava fylgjandi mát:

1) 105 metrar x 68 metrar.

Um tað av byggitøkniligum ávum ikki er møguleiki fyri at nýta omanfyri nevndu mát, kunnu ístaðin fylgjandi mát verða loyvd:

1) Longd: 100 metrat til 105 metrar.
2) Breidd: 64 metrar til 68 metrar.

*Frástøður til girðingina:*

1) Kring leikvøllin skal frástøðan frá bak- og síðulinju til girðingina verða í minsta lagi 3 metrar.

*Skiftisleikaraskýli:*

Skiftisleikaraskýli við leikvølli skulu lúka fylgjandi treytir:

1) Skulu fyri hvørt lið rúma í minsta lagi 10 persónar við 50 cm bonkarplássi fyri hvønn persón.
2) Í minsta lagi 10 metrar skal vera ímillum skiftisleikaraskýlini, og tey skulu vera í minsta lagi 5 metrar frá miðlinjuni.
3) Tryggjast skal við girðing, eftirliti ella á annan hátt, at eykamenn, liðleiðarar v.m. ikki verða órógvaði ella álopin av áskoðarum.
4) Frástøðan til síðulinju skal vera í minsta lagi 3 metrar.

**§ 2. Serstakar treytir til leikvøll í Meistaradeildini og 1. Deild**

Feløg sum luttaka í landskapping í Meistaradeildini og/ella 1. Deild, sum Fótbóltssamband Føroya fyriskipar, skulu, umframt omanfyri nevndu almennu treytir, eisini lúka treytirnar til leikvøll, ið eru ásettar í fylgiskjali 1 til hetta rundskriv.

**§ 3. Treytir til leikvøll í UEFA kappingum**

Feløg sum luttaka í kappingum sum UEFA fyriskipar, skulu lúka tær treytir sum UEFA ásetir í til hvørja tíð galdandi *"UEFA Stadium Infrastructure Regulations",* og skal leikvøllurin í minsta lagi verða UEFA kategori 2 leikvøllur til UEFA dystir hjá monnum og kategori 1 leikvøllur til UEFA dystir hjá kvinnum.

## Kapittul 2. Góðkenning

**§ 4. Mannagongd fyri góðkenning av leikvølli**

Loyvisumsitingin í FSF sýnar eftir tørvi leikvøllirnar.

Sýnið kann verða framt á staðnum og/ella feløg kunnu verða biðin um at senda ávísar upplýsingar til Loyvisumsitingina, sum lýsa viðurskiftini við leikvøllin.

Loyvisumsitingin boðar skrivliga felagnum frá um leikvøllurin kann góðkennast ella um tað er neyðugt at gera tillagingar, áðrenn leikvøllurin kann takast í nýtslu.

Loyvisumsitingin kann taka aftur góðkenning av leikvølli um felagið ikki longur lýkur ásettar treytir í hesum rundskrivi.

Avgerðir hjá Loyvisumsitingini um at nokta góðkenning av leikvølli kunnu innan 7 dagar kærast til Aga- og etiskunevndina í FSF, sum tekur endaliga avgerð í málinum. Avgerðin hjá Aga- og etiskunevndini kann ikki kærast til hægri myndugleika.

**§ 5. Undantaksloyvi**

Loyvisumsitingin kann geva tíðaravmarkað undantaksloyvi til ásettar treytir til leikvøll, tó í mesta lagi upp til 1 ár í senn.

Felag sum áður hevur fingið játtað undantaksloyvi fyri 1 ár, kann ikki rokna við at hetta undantaksloyvi verður longt, og skal tí skjótast gjørligt skipa fyri, at neyðugar tillagingar verða gjørdar til leikvøllin. Um útlit ikki eru fyri at felagið kann fáa viðurskiftini í rættlag til tíðina, so eigur felagið at taka stig til at avtala um lán av leikvølli verður gjørd við annað fótbóltsfelag ella kommunu við einum FSF góðkendum leikvølli.

**§ 6. Trygdarváttan**

Áðrenn FSF kann góðkenna leikvøllin skal felagið senda eina trygdarváttan til FSF, har kommunali myndugleikin á staðnum váttar, at leikvøllurin lýkur ásettar reglur um trygd, herundir brunatrygd. Hendan váttanin skal í minsta lagi fevna um fylgjandi:

1) at leikvøllurin og kringumstøðurnar til vøllin, so sum áskoðaraskýli, áskoðarapláss, felagshús, rýmingarleiðir o.a., lýkur øll neyðug trygdarkrøv, herundir krøv til brunatrygd í kommunalari lóggávu, og
2) at nøktandi atkomumøguleikar eru til og frá leikvøllinum, sum tryggjar at sjúkrabilar, sløkkiliðsbilar og løgregla eftir tørvi hava ótarnaða atgongd til leikvøllin.

**§ 7. Gildiskoma**

Hetta rundskriv er samtykt av Starvsnevndini í FSF tann 18. desember 2025.

Rundskrivið fær gildi beinanvegin. Samstundis verður rundskriv um treytir til leikvøll (Vallarreglugerð 2025), sum varð samtykt av Starvsnevndini tann 25. desember 2024, sett úr gildi.

## Fylgiskjal 1.

### Vøllurin:

| Nr.: | Slag: | Treyt til Meistaradeildina: | Treyt til 1. Deild: |
|---|---|---|---|
| 1 | Vallarstødd | Longd: 100 – 105m<br>Breidd: 64 – 68m | Longd: 100 – 105m<br>Breidd: 64 – 68m. |
| 2 | Frástøða til girðing | Kring allan vøllin skal frástøðan frá bak- og síðulinju til girðingina verða í minsta lagi 3 metrar. | Kring allan vøllin skal frástøðan frá bak- og síðulinju til girðingina verða í minsta lagi 3 metrar. |
| 3 | Girðing | Vøllurin skal hava tætta girðing, sum er gjørd úr tilfari sum ikki er til ampa fyri leikara ella áskoðara. Møguligt glopp undir girðingini má ikki vera so stórt, at fótur ella fløska ella líknandi sleppur inn undir. Har sum eykamál verða sett, skal somuleiðis tøtt girðing vera til leikvøllin (t.d. portur), soleiðis at eykamálini standa uttanfyri girðingina. | Vøllurin skal hava tætta girðing, sum er gjørd úr tilfari sum ikki er til ampa fyri leikara ella áskoðara. Møguligt glopp undir girðingini má ikki vera so stórt, at fótur ella fløska ella líknandi sleppur inn undir. Har sum eykamál verða sett, skal somuleiðis tøtt girðing vera til leikvøllin (t.d. portur), soleiðis at eykamálini standa uttanfyri girðingina. |
| 4 | Skiftisleikaraskýli | Skulu fyri hvørt lið rúma í minsta lagi 14 persónar við 50 cm bonkarplássi fyri hvønn persón.<br>Í minsta lagi 10 metrar skal vera ímillum skiftis-leikaraskýlini, og tey skulu vera í minsta lagi 5 metrar frá miðlinjuni.<br>Tryggjast skal við girðing, eftirliti ella á annan hátt, at eykamenn, liðleiðarar v.m. ikki verða órógvaði ella álopin av áskoðarum.<br>Frástøðan til síðulinju skal vera í minsta lagi 3 metrar. | Skulu fyri hvørt lið rúma í minsta lagi 14 persónar við 50 cm bonkarplássi fyri hvønn persón.<br>Í minsta lagi 10 metrar skal vera ímillum skiftis-leikaraskýlini, og tey skulu vera í minsta lagi 5 metrar frá miðlinjuni.<br>Tryggjast skal við girðing, eftirliti ella á annan hátt, at eykamenn, liðleiðarar v.m. ikki verða órógvaði ella álopin av áskoðarum.<br>Frástøðan til síðulinju skal vera í minsta lagi 3 metrar. |
| 5 | Tekniska økið | Tekniska økið kann røkka ein metur út frá skiftisleikaraskýlinum á | Tekniska økið kann røkka ein metur út frá skiftisleikaraskýlinum á |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | báðum síðum, og skal ikki verða nærri enn 1 metur frá síðulinjuni. | báðum síðum, og skal ikki verða nærri enn 1 metur frá síðulinjuni. |
| 6 | Øki til fotografar | Um fotografar fáa loyvi til at vera innanfyri girðingina, so skulu hesir halda seg til økið fyri fotografar sum teimum verður ávíst. | Um fotografar fáa loyvi til at vera innanfyri girðingina, so skulu hesir halda seg til økið fyri fotografar sum teimum verður ávíst. |
| 7 | Hátalaraskipan | Ein hátalaraskipan skal verða á leikvøllinum. | |
| 8 | VAR | P-pláss við atgongd til 230 V el-stikk skal vera tøkt til VAR bilin.<br>Pláss skal vera tøkt til VAR kamera har hesi verða sett upp sum ávíst av FSF. | |
| 9 | Klokka ella stórskerm | Leikvøllurin skal hava klokku ella stórskerm. | Leikvøllurin skal hava klokku ella stórskerm. |
| 10 | Elektronisk talva til útskiftingar | Ein elektronisk talva til útskiftingar skal vera tøk til heimadystir. | Ein elektronisk talva til útskiftingar skal vera tøk til heimadystir. |
| 11 | Flaggstengur | 5 flaggstengur | |
| 12 | Málini | 7,32m millum stengurnar, og<br>2,44 m millum linju og yvirleggjara. | 7,32m millum stengurnar, og<br>2,44 m millum linju og yvirleggjara. |
| 13 | Eykamál | 1 eykamál skal vera til taks uttanfyri girðingina til vøllin. Eykamálini skulu ikki setast aftanfyri málið, men uttanfyri 16 meturin og uttanfyri girðingina. | 1 eykamál skal vera til taks uttanfyri girðingina til vøllin. Eykamálini skulu ikki setast aftanfyri málið, men uttanfyri 16 meturin og uttanfyri girðingina. |
| 14 | Málstengur | Standa miðskeiðis niður á linjuna. Málstengurnar og tvørstongin skulu hava somu tjúkd, sum ikki má vera meir enn 12 cm. | Standa miðskeiðis niður á linjuna. Málstengurnar og tvørstongin skulu hava somu tjúkd, sum ikki má vera meir enn 12 cm. |
| 15 | Linjur | Beinar, slættar og onki glopp. Mállinjurnar skulu hava somu tjúkt sum málstengur og tvørtræið. Tá nýtt graslíki verður lagt á skulu linjurnar á vøllinum hava somu breidd sum málstengurnar. | Beinar, slættar og onki glopp. Mállinjurnar skulu hava somu tjúkt sum málstengur og tvørtræið. Tá nýtt graslíki verður lagt á skulu linjurnar á vøllinum hava somu breidd sum málstengurnar. |

**Áskoðarar:**

| Nr.: | Slag: | Treyt til Meistaradeildina: | Treyt til 1. Deild: |
|---|---|---|---|
| 16 | Sitipláss | Í minsta lagi 300 setur kring vøllin við í minsta lagi 30 cm rygglen. Sitiplássini skulu verða sett soleiðis, at gott útsýni er til leikvøllin. | |
| 17 | WC | Eitt WC pr. 200 kvinnur.<br>Eitt WC og Pissoir pr. 200 menn.<br>Atgongd til WC fyri rørslutarnaði. | Nøktandi WC umstøður til bæði kyn.<br>Atgongd til WC fyri rørslutarnaði. |
| 18 | Rørslutarnaði | Rørslutarnaðir persónar skulu kunnu sleppa inn á áskoðaraøkið uttan óneyðugan ampa. | Rørslutarnaðir persónar skulu kunnu sleppa inn á áskoðaraøkið uttan óneyðugan ampa. |

**Graslíki og náttúrugras:**

| Nr.: | Slag: | Treyt til Meistaradeildina: | Treyt til 1. Deild: |
|---|---|---|---|
| 19 | Graslíki | Graslíki skal lúka FIFA 1 Star treytirnar fyri stoytjavnan (57% - 69 %).<br>Verður nýtt graslíki lagt á, skal graslíkið í minsta lagi lúka treytirnar til FIFA Quality ella FIFA Quality Pro graslíki. | Graslíki skal lúka FIFA 1 Star treytirnar fyri stoytjavnan (57% - 69 %).<br>Verður nýtt graslíki lagt á, skal graslíkið í minsta lagi lúka treytirnar til FIFA Quality ella FIFA Quality Pro graslíki. |
| 20 | Gummiperlur í graslíki | Gummi skal ikki smitta av. | Gummi skal ikki smitta av. |
| 21 | Gróður á graslíki | Eingin gróður skal vera á vøllinum. | Eingin gróður skal vera á vøllinum. |
| 22 | Náttúrugrasvøllur | Vøllur úr náttúrugrasi skal vera slættur og javnur. | Vøllur úr náttúrugrasi skal vera slættur og javnur. |

**Rúm í felagshøli:**

| Nr.: | Slag: | Treyt til Meistaradeildina: | Treyt til 1. Deild: |
|---|---|---|---|
| 23 | Umklæðingarrúm til hvørt lið | Umklæðingarrúm til í minsta lagi 20 persónar.<br>Í minsta lagi 20 m2 til støddar.<br>Í minsta lagi 5 brúsur og 1 WC. | Umklæðingarrúm til í minsta lagi 20 persónar.<br>Í minsta lagi 20 m2 til støddar.<br>Í minsta lagi 5 brúsur og 1 WC. |
| 24 | Umklæðingarrúm til dómarar | Í minsta lagi 1 brúsa, 1 WC inni og borð við 5 stólum. Hølini skulu hava hóskandi stødd. | Í minsta lagi 1 brúsa, 1 WC inni og borð við 5 stólum. Hølini skulu hava hóskandi stødd. |

**Trygd:**

| Nr.: | Slag: | Treyt til Meistaradeildina: | Treyt til 1. Deild: |
|---|---|---|---|
| 25 | Trygdarváttan | Áðrenn FSF kann góðkenna leikvøllin skal felagið senda eina trygdarváttan til FSF, har kommunali myndugleikin á staðnum váttar, at leikvøllurin lýkur ásettar reglur um trygd, herundir brunatrygd. Hendan váttanin skal í minsta lagi fevna um fylgjandi:<br>1) at leikvøllurin og kringumstøðurnar til vøllin, so sum áskoðaraskýli, áskoðarapláss, felagshús, rýmingarleiðir o.a., lýkur øll neyðug trygdarkrøv, herundir krøv til brunatrygd í kommunalari lóggávu, og | Áðrenn FSF kann góðkenna leikvøllin skal felagið senda eina trygdarváttan til FSF, har kommunali myndugleikin á staðnum váttar, at leikvøllurin lýkur ásettar reglur um trygd, herundir brunatrygd. Hendan váttanin skal í minsta lagi fevna um fylgjandi:<br>1) at leikvøllurin og kringumstøðurnar til vøllin, so sum áskoðaraskýli, áskoðarapláss, felagshús, rýmingarleiðir o.a., lýkur øll neyðug trygdarkrøv, herundir krøv til brunatrygd í kommunalari lóggávu, og |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 2) at nøktandi atkomumøguleikar eru til og frá leikvøllinum, sum tryggjar at sjúkrabilar, sløkkiliðsbilar og løgregla eftir tørvi hava ótarnaða atgongd til leikvøllin. | 2) at nøktandi atkomumøguleikar eru til og frá leikvøllinum, sum tryggjar at sjúkrabilar, sløkkiliðsbilar og løgregla eftir tørvi hava ótarnaða atgongd til leikvøllin. |
| 26 | Kontrolrúm | Um Kappingarnevndin í FSF metir at talan er um "high-risk" dyst, so skal leikvøllurin hava kontrolrúm. | |
| 27 | Rúm til fyrstuhjálp | Leikvøllurin skal hava rúm til fyrstuhjálp og nøktandi fyrstuhjálparútgerð til áskoðarar og/ella leikarar. Rúmið skal verða lætt atkomiligt, eisini hjá sjúkrabili. | Leikvøllurin skal hava rúm til fyrstuhjálp og nøktandi fyrstuhjálparútgerð til áskoðarar og/ella leikarar. Rúmið skal verða lætt atkomiligt, eisini hjá sjúkrabili. |
| 28 | Trygd til og frá vølli fyri leikarar og dómarar | Felagið sum hevur heimadyst hevur skyldu til at tryggja persónligu trygdina hjá leikarum og dómarum, tá ið hesir ferðast til og frá vøllinum. FSF kann, eftir konkreta meting í hvørjum einstøkum føri, áleggja felagnum eyka krøv til trygd, um teinurin ímillum leikvøllin og umklæðingarhølini er langur.<br>Inngongdir til vøllin skulu vera afturlætnar og tryggjast skal at eingin óviðkomandi sleppur á vøllin meðan leikt verður og meðan upphitingin fer fram. | Felagið sum hevur heimadyst hevur skyldu til at tryggja persónligu trygdina hjá leikarum og dómarum, tá ið hesir ferðast til og frá vøllinum. FSF kann, eftir konkreta meting í hvørjum einstøkum føri, áleggja felagnum eyka krøv til trygd, um teinurin ímillum leikvøllin og umklæðingarhølini er langur.<br>Inngongdir til vøllin skulu vera afturlætnar og tryggjast skal at eingin óviðkomandi sleppur á vøllin meðan leikt verður og meðan upphitingin fer fram. |

**Ognarviðurskifti og nýtsla av leikvølli:**

| Nr.: | Slag: | Treyt til Meistaradeildina: | Treyt til 1. Deild: |
|---|---|---|---|
| 29 | Lýsing av ognarviðurskiftum | Felagið skal senda inn skrivliga váttan til FSF, sum lýsir ognarviðurskiftini av leikvøllinum og kringumstøðurnar, og vátta at felagið hevur loyvi til at nýta leikvøllin og kringumstøðurnar til í minsta lagi endan á kappingarárinum. | Felagið skal senda inn skrivliga váttan til FSF, sum lýsir ognarviðurskiftini av leikvøllinum og kringumstøðurnar, og vátta at felagið hevur loyvi til at nýta leikvøllin og kringumstøðurnar til í minsta lagi endan á kappingarárinum. |

**Ljós á leikvølli:**

| Nr.: | Slag: | Treyt til Meistaradeildina: | Treyt til 1. Deild: |
|---|---|---|---|
| 30 | Ljósviðurskifti á leikvøllinum | Felagið skal í seinasta lagi til **kappingarársbyrjan 2026**, hava ljósmastrar kring leikvøllin, har miðal ljósstyrkin í minsta lagi er 250 $E_V$ (lx) á vøllinum. Mælt verður til at nýta 4 ljósmastrar, ein í hvørjum horni á vøllinum, og um eitt størri tal av ljósmastrum verður valt, so skulu atlit takast til, at hesar mastrar ikki órógva sjónvarping av dystum.<br>Áðrenn farið verður undir verkætlanina at seta upp nýggj ljós ella at dagføra verandi ljós, skal umsókn við neyðugum frágreiðingum um verkætlanina, ið er tilevnað við hjálp frá serfrøðingi / verkfrøðingi, ið hevur gott fakligt innlit innan el og ljós, | Felagið skal í seinasta lagi til **kappingarársbyrjan 2026**, hava ljósmastrar kring leikvøllin, har miðal ljósstyrkin í minsta lagi er 250 $E_V$ (lx) á vøllinum. Mælt verður til at nýta 4 ljósmastrar, ein í hvørjum horni á vøllinum, og um eitt størri tal av ljósmastrum verður valt, so skulu atlit takast til, at hesar mastrar ikki órógva sjónvarping av dystum.<br>Áðrenn farið verður undir verkætlanina at seta upp nýggj ljós ella at dagføra verandi ljós, skal umsókn við neyðugum frágreiðingum um verkætlanina, ið er tilevnað við hjálp frá serfrøðingi / verkfrøðingi, ið hevur gott fakligt innlit innan el og ljós, |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | sendast Loyvisumsiting FSF´s til góðkenningar.<br><br>Feløg sum ikki lúka treytina til kappingarársbyrjan í 2026, skulu fyrileggja eina skrivliga ætlan fyri nær ljósviðurskiftini koma í rættlag, og harafturat gera avtalu við eigara av øðrum leikvølli sum lýkur omanfyri nevndu treytir til FSF góðkend ljós, og verður hesin leikvøllurin nýttur tá ljósviðurskiftini gera at dystir mugu leikast á vølli við nøktandi ljósum. | sendast Loyvisumsiting FSF´s til góðkenningar.<br><br>Feløg sum ikki lúka treytina til kappingarársbyrjan í 2026, skulu fyrileggja eina skrivliga ætlan fyri nær ljósviðurskiftini koma í rættlag, og harafturat gera avtalu við eigara av øðrum leikvølli sum lýkur omanfyri nevndu treytir til FSF góðkend ljós, og verður hesin leikvøllurin nýttur tá ljósviðurskiftini gera at dystir mugu leikast á vølli við nøktandi ljósum. |

**Skýli:**

| Nr.: | Slag: | Treyt til Meistaradeildina: | Treyt til 1. Deild: |
|---|---|---|---|
| 31 | Áskoðaraskýli við leikvøllin | Felagið skal í seinasta lagi til **kappingarársbyrjan 2026**, hava áskoðaraskýli til í minsta lagi 300 setur við leikvøllin. Áskoðaraskýlið skal verða bygt soleiðis, at tak/yvirdekningur er til nevndu setur, og skal útsýnið til leikvøllin verða darvað sum minst.<br>Pallur til sjónvarpsupptøkur skal setast upp undir taki, og vera settur miðskeiðis á langsíðuni av vøllinum.<br><br>Áðrenn farið verður undir verkætlanina skal umsókn við neyðugum frágreiðingum um | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | verkætlanina, ið er tilevnað við hjálp frá byggikønum serfrøðingi, sendast Loyvisumsiting FSF´s til góðkenningar.<br><br>Feløg sum ikki lúka treytina til kappingarársbyrjan í 2026, skulu fyrileggja eina skrivliga ætlan fyri nær viðurskiftini koma í rættlag.<br><br>**Evstamark fyri at fáa omanfyri nevndu skýlisviðurskifti í rættlag er til kappingarársbyrjan 2027.** Um skýlisviðurskiftini ikki eru komin í rættlag tá, skal felagið gera avtalu við eigara av øðrum leikvølli sum lýkur allar treytirnar í Vallarreglugerð FSF´s, og verða heimadystirnir hjá felagnum spældir á FSF góðkendum leikvølli inntil skýlisviðurskiftini eru komin í rættlag og endaliga góðkend av FSF. | |
| 32 | Skýli til 4. dómaran | Felagið skal í seinasta lagi til **kappingarársbyrjan 2026** hava skýli til 4. dómaran, sum skal vera staðsett millum skiftisleikaraskýlini, og tryggjast skal, at hóskandi frástøða er til áskoðarar, soleiðis at 4. dómarin ikki verður órógvaður í sínum arbeiði. | |